

# Mánaðarbræv

Sendistova Føroya í Reykjavík — Juni 2016

## KOMANDI TILTØK

20. august verður Mentanarnátt í Reykjavík. Sendistovan tekur, sum vanligt, lut í hesum tiltaki, við m.a.:

- Opið hús í Sendistovuni við føroyskum mati, tónleiki, list, røðum og nógvum øðrum góðum
- Føroyskir tónleikarar og listaframsýning í Hørpu

Frá 18. juli til 12. august verður sendistovan stongd vegna summarfrí. Tó er telefonisk og telduposta vakttænasta.

Næsta mánaðarbræv kemur í september.



*Mynd 1. Íslendski uttanríkisráðharrin Lilja D. Alfreðsdóttir*

## GUÐNI TH. JÓHANNESSON VERÐUR NÝGGJUR FORSETI

Tá atkvøðurnar frá valinum 25. juni vórðu taldar, so hevði Guðni Th. Jóhannesen fingið 39,1%, meðan tann, sum fekk næstflest varð Halla Tómasdóttir, ið fekk 27,9%. Valluttøkan varð 75,7%. Valluttøkan til seinasta val, í 2012, var 69,3%. Tá Guðni boðaði frá, at hann stillaði upp sum forsetavalevni, vístu fyrstu veljarakanningarnar, at hann fekk um 65% av atkvøðunum, men beint undan forsetavalinum vístu veljarakanningarnar, at Guðni fekk uml. 45%.



*»Guðni Th. Jóhannesson verður tilnevndur sum forseti 1. august og er 6. forseti Íslands«*

Guðni Th. Jóhannesson varð føddur í 1968, hann er doktari í søgufrøði og arbeiðir sum granskari og undirvísari í Háskúla Íslands. Guðni er útbúgvin bachelor í søgu og stjórnmálafrøði frá Warwick University í Onglandi í 1991, magistari í søgu frá Háskóla Íslands í 1997. Í 1999 gjørdist hann kandidatur í søgu frá Oxford University. Í 2003 gjørdist hann ph.d. í søgu frá Queen Mary, University of London.

Guðni hevur granskað í søgufrøði og er serøki hansara nýggj politisk søga. Guðni hevur granskað nógv í forsetaembætinum og fyrrverandi forsetum.

Guðni hevur sagt, at hann vil verða ein forseti, sum savnar alla tjóðina. Hann vil tosa søk teirra veiku, tí hann heldur hini klára seg. Guðni vil gjarna broyta stjórnarskipanina, so m.a. vald og starvsøki hjá forsetanum verður meira nágreinað.

## *ÍSLAND ÆTLAR AT STAÐFESTA VEÐURLAGSSÁTTMÁLAN Í HEYST*

Lilja Dögg Alfreðsdóttir, íslendskur uttanríkisráðharri hevur boðað frá í Altinginum, at veðurlagssáttmálin, sum varð undirskrivaður í apríl í ár í New York, verður klárur til at samtykkja í heyst.
Uttanríkisráðharrin greiddi frá, at starvsfólkið í Uttanríkisráðnum arbeiddi miðvíst við málinum og at roknað varð við, at sáttmálin kundi leggjast fyri Altingið í august, so hann kundi samtykkjast í heyst. Lilja nevndi eisini, at sjálvandi skal Ísland verða í fremstu røð í sambandi við veðurlagssáttmálan.

## ÍSLENDSK ÁTØK Í SAMBANDI VIÐ BREXIT



Íslendska stjórnin hevur viðgjørt støðuna í sambandi við, at Bretland ynskir at fara úr ES. Bretland er ein av mest týðandi handilspartnarum hjá Íslandi. 10% av fiskaútflutninginum hjá Íslandi fer til Bretlands og 19% av ferðafólkunum, sum koma til Íslands, koma úr Bretlandi. Londini bæði hava nógv samstarv innan mong øki í sambandi við EBS.

Stjórnin hevur tikið stig til, at seta ein arbeiðsbólk, mannaðan av fimm stjórnarráðum, við tí endamáli at samskipa politisku uppgávurnar. Ætlanin er eisini, at arbeiðsbólkurin skal fáa ein óheftan granskingarstovn til at meta um búskaparligu avleiðingarnar av møguligum búskaparligum og handilsligum møguleikum millum Ísland og Bretland.

Les meira her (við útgreiningum á íslendskum)

## FELAGS YVIRLÝSING MILLUM ÍSLAND OG USA UNDIRRITAÐ



29. juni skrivaði íslendski uttanríkisráðharrin, Lilja D. Alfreðsdóttir, og amerikanski vararáðharrin, Robert O. Work, undir eina felags yvirlýsing um trygdar og verjumál. Yvirlýsingin er eitt ískoyti til felags yvirlýsingina, sum londini bæði undirskrivaðu í 2006, tá amerikanski herurin helt uppat, at vera fast til staðar í Íslandi. Yvirlýsingin í 2006 byggir á verjuavtaluna frá 1951 millum londini.

Trygdarumhvørvið í Evropa, eisini í tí Norður Atlantiska økinum, hevur broytt seg seinastu 10 árini. Íslendsku og amerikansku myndugleikarnir samdust um, at neyðugt er at varpa ljós á hetta í einari nýggjari yvirlýsing, sigur íslendski uttanríkisráðharrin.

Les meira her (á enskum)

## VØKSTUR Í TALI AV FØROYSKUM SJÚKLINGUM, SUM FÁA VIÐGERÐ Í ÍSLANDI




*Mynd 2. Yvirlit yvir tal av føroyskum sjúklingum, sum fáa viðgerð í Íslandi*

Samstarvið millum sjúkrahúsini í Føroyum og Landspítalið gongur væl. Í 2010 varð avtala gjørd millum partarnar. Í 2013 vóru 43 sjúklingar til viðgerðar í Íslandi, í 2014 vóru tað 72, í 2015 vóru tað 102 og fyrstu 5 mánaðirnar í ár hava 76 føroyingar fingið viðgerð í Íslandi. Nógv bendir á, at talið í ár kann fara væl uppum 100 og sostatt kann roknast við, at stóra økingin heldur fram í ár. Hóast arbeiðssteðgir vóru hjá Landspítalinum í 2014/2015, sum m.a. hevði við sær, at færri føroyskir sjúklingar vórðu sendir til Íslands hetta tíðarbil enn annars ætlað, so var talan um stóran vøkstur í tali av sjúklingum hesi bæði árini. Viðgerðirnar, sum fara fram í Íslandi, eru fyrst og fremst innan hesi øki: undirlívskrabba, bróstkrabba, karkirurgi og fertilitetsviðgerðir.

Nevnast kann, at Landssjúkrahúsið er væl nøgt við samstarvið. Samstarvið virkar væl og royndirnar við Landspítalið eru góðar. Nøgdsemiskanning varð gjørd í 2013-2014 og vísir hon, at sjúklingarnir eru væl nøgdir. Tó vísir kanningin, at nøgdsemið ikki er so stórt viðvíkjandi tænasturnar í sjúklingahotellinum. Hesum verður arbeitt við og eitt nýtt sjúklingahotell er í gerð. Ein nýggj nøgdsemiskanning er ávegis.

Landspítalið hevur sett ein føroying í starv, sum samskipara. Hetta er sera positivt fyri samstarvið. Alt í alt eitt samstarv, sum partarnir eru væl nøgdir við og sum er í stórari menning.

## FERÐAVINNAN VAR 31% AV ÚTFLUTNINGSVIRÐINUM Í 2015

Vøksturin í ferðavinnuni í Íslandi hevur seinastu árini verið sera stórur. Í 2015 umboðaði ferðavinnan 31% av útflutningsvirðinum, meðan fiskivinnan einans stóð fyri 22%. Í 2009 vóru tølini næstan vend við, tí tá umboðaði fiskivinnan 26%, meðan ferðvinnan tó stóð fyri 20%. Í 2013 vóru báðar vinnugreinarnar eisini stórar, men síðani 2014 er ferðavinnan farin framum fiskivinnuna. Sí annars mynd til vinstru.




*Mynd 3. Yvirlit yvir útflutning av vørum og tænastum.*

Ein uppgerð, sum íslendska ferðavinnan hevur gjørt yvir talið av fremmandum ferðafólkum, ið koma til Íslands gjøgnum flogvøllin í Keflavík, har stórt sæð øll ferðafólk koma. Í stuttum kann sigast, at talið av ferðafólkum, sum komu til Íslands í 2010, var tilsamans knapt 460.000, meðan hetta tal í 2015 var komið uppá knapt 1.262.000. Stóri vøksturin stavar serliga frá ferðafólkum úr Bretlandi og Amerika, sum í 2015 vóru góð 39% av ferðafólkahópinum. Sí nærri í mynd til vinstru. Afturat hesum tølum skulu so leggjast tey ferðafólk, sum ferðast umvegis Seyðisfjørð, Akureyri og aðra staðni, sum tó bert er ein brotpartur av samlaða ferðafólkatalinum.

Foreign passengers through Keflavík airport by citizenship

| | 2010 | | 2015 | |
|---|---|---|---|---|
| | Number | % | Number | % |
| Passengers, total | 459,252 | 100.0 | 1,261,938 | 100.0 |
| U.S.A. | 51,166 | 11.1 | 242,805 | 19.2 |
| U.K. | 60,326 | 13.1 | 241,024 | 19.1 |
| Germany | 54,377 | 11.8 | 103,384 | 8.2 |
| France | 29,255 | 6.4 | 65,822 | 5.2 |
| Norway | 35,662 | 7.8 | 51,402 | 4.1 |
| Denmark | 38,139 | 8.3 | 49,225 | 3.9 |
| China | 5,194 | 1.1 | 47,643 | 3.8 |
| Canada | 13,447 | 2.9 | 46,654 | 3.7 |
| Sweden | 27,944 | 6.1 | 43,096 | 3.4 |
| Netherlands | 17,281 | 3.8 | 29,546 | 2.3 |
| Spain | 12,237 | 2.7 | 27,166 | 2.2 |
| Poland | 13,253 | 2.9 | 27,079 | 2.1 |
| Switzerland | 9,163 | 2.0 | 25,935 | 2.1 |
| Italy | 9,692 | 2.1 | 23,817 | 1.9 |
| Japan | 5,580 | 1.2 | 16,547 | 1.3 |
| Finland | 11,012 | 2.4 | 16,021 | 1.3 |
| Russia | ... | ... | 4,877 | 0.4 |
| Other countries | 65,524 | 14.3 | 199,895 | 15.8 |

Icelandic Tourist Board

*Mynd 4. Útlendsk ferðafólk gjøgnum Keflavíkar flogvøll*

Í ár verður roknað við, at ferðafólkatalið verður uml. 1,7 mió. ella ein vøkstur uppá uml. 30% í mun til 2015. Matstovu- og hotellkostnaðurin er nógv hækkaður og sæst tað m.a. aftur í at sambært "*Vegleiðing til ferðauppgerð fyri tænastuferðir uttanlands, Galdandi frá 1. januar 2016*", sum føroyska Fíggjarmálaráðið gevur út á hvørjum ári, er "*í mesta lagi*" upphæddin til hotell í Íslandi 50.605 ISK fyri náttina, sum við dagsins kursi svarar til uml. 2.665 DKK, meðan sami prísur í Danmark er 1.008 DKK. Sambært omanfyrinevnda yvirliti, so er Ísland tað land, sum hevur hægstu hotell prísir, ið eru bæði hægri enn Washington D.C. og New York. Eisini eru prísirnir fyri bilútleigan hækkaðir nógv. Sama ger seg galdandi á húsamarknaðinum, har bæði bústaðar- og leiguprísir er hækkaðir sera nógv. Stórt trýst er á eftirspurninginum, sum er munandi størri enn útboðið og hetta lutfall bara veksur. Tí er veruliga talan um marknaðin hjá seljarunum.

## TILMÆLI UM AT HÆKKA TOSKAKVOTUNA VIÐ 5.000 TONSUM

Íslendska Havstovan (Hafrannsóknarstofnun) hevur givið sítt tilmæli til komandi fiskiár. Mælt verður til at hækka toskaveiðuna við 5.000 tonsum, so samlaða toskaveiðan verður 244.000 tons. Talan er um eina hækking uppá góð 2%.
Víst verður á, at seinastu 40 árini, hevur gýtingarstovnurin ikki verið størri enn nú. Gunnar Bragi Sveinsson, fiskimálaráðharri, sigur at hetta eru góð tíðindi fyri íslendska samfelagið og flestu fiskastovnar runt Ísland eru vaksnir alsamt seinastu árini og vísir á týdningin av, at umsitingin av fiskastovnunum er grundaður á vísindaliga tilráðing. Málið hevur verið viðgjørt í stjórnini og er semja um at fylgja tilráðingini.



*Mynd 5. Íslendski fiskimálaráðharrin Gunnar Bragi Sveinsson*

Tá hugsað verður um toskaveiðuna í føroyska sjóøkinum, sum var knapt 7.800 tons í 2015, sambært Hagstovuni, og tilmælið frá Havstovuni til komandi fiskiár um at lækka fiskidagarnar við 50% av brúktu fiskidøgunum í hesum fiskiári, hjá teimum skipum/bátum sum veiða tosk, so er talan um heilt hvør sína støðu í Íslandi og í Føroyum, hvat toskastovninum og toskafiskiskapinum viðvíkur.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## TOSKAVEIÐAN HEVUR STÓRAN TÝDNING

**Fish catch by species**

| | 2005 | | 2015[1] | |
|---|---|---|---|---|
| | Tonnes | Value 1,000 ISK | Tonnes | Value 1,000 ISK |
| **Total catch** | **1,668,927** | **67,920,065** | **1,319,395** | **151,301,060** |
| Cod | 212,456 | 24,924,027 | 243,871 | 60,963,620 |
| Redfish | 61,535 | 5,466,266 | 58,093 | 13,442,527 |
| Haddock | 96,580 | 8,881,445 | 40,711 | 11,467,498 |
| Mackerel | 363 | 9,236 | 168,251 | 10,359,701 |
| Capelin | 594,632 | 5,030,553 | 336,562 | 9,977,961 |
| Saithe | 67,736 | 3,086,148 | 48,165 | 9,528,507 |
| Greenland halibut | 13,021 | 3,035,334 | 12,448 | 7,462,825 |
| Blue whiting | 265,890 | 1,489,498 | 214,954 | 5,666,444 |
| Herring | 102,967 | 1,988,124 | 69,975 | 3,571,501 |
| Shrimp | 8,657 | 870,430 | 6,316 | 2,974,540 |
| Capelin roe | 10,428 | 449,396 | 16,401 | 2,683,778 |
| Norwegian spring-spawning herring | 161,693 | 5,161,064 | 44,005 | 2,360,809 |
| Ling | 4,307 | 261,489 | 11,536 | 1,828,508 |
| Other | 68,662 | 7,267,053 | 48,110 | 9,012,841 |

[1] Preliminary data.

*Mynd 6. Yvirlit yvir fiskiskap eftir sløgum.*

Verður hugt at veiðutølunum og tey samanborin við virðið av veiðuni, so kann m.a. tað fáast burturúr sí talvuna til vinstru, at toskaveiðan í 2005 var 212.456 tons og miðal kiloprísurin var 6,17 DKK, meðan veiðan í 2015 var 243.871 tons og miðal kiloprísurin 13,16 DKK ella ein øking í nøgd uppá knapt 15% og í virði gott 113%.

Í mun til samlaðu fiskiveiðuna, so var virðið av toskaveiðuni í 2005 36,7%, meðan hetta tal fyri 2015 var 40,3%.

Samlaða virðið av toskaveiðuni í 2005 var 1,3 mia. DKK og í 2015 var tað 3,2 mia. DKK.

## NETTO TILFLYTINGIN TIL ÍSLANDS VAKS VIÐ 30% Í 2015




*Mynd 7. Yvirlit yvir til- og fráflyting í 2015.*

Nettotilflytingin til Íslands – munurin millum tey, sum flyta av landinum og tey, sum flyta til landið – var 1.451 í 2015. Hetta er 30% meira enn seinasta ár.
Av teimum 6.010 fólkunum, sum fóru av landinum, vóru 3.763 íslendingar, meðan 2.247 vóru fólk við øðrum tjóðskapi og fluttu aftur til heimlandið ella til eitt annað land. Danmark var tað land, sum flestu íslendingar fluttu til. Í fjør fluttu 27% av teimum íslendingum, sum fluttu av landinum, til Danmarkar. Tilflytingin til Danmarkar, Noreg og Svøríki stóð fyri 73% av teimum íslendingum, sum fluttu úr Íslandi í fjør.
Sum tað sæst á myndini til vinstru, so er største til- og fráflytingin í aldursbólkunum 20-24 ár og 25-29 ár. Hesir báðir aldursbólkarnir stóðu fyri 39% av til- og fráflytingini í fjør. Eisini eru aldursbólkarnir 30-34 ár og 35-39 ár væl umboðaðir í til- og fráflytingini.

*Sí meira her (á enskum)*


### Samband

**Sendistova Føroya í Reykjavík**
Túngata 14
101 Reykjavík
+354 511 3200
reykjavik@tinganes.fo
www.uvmr.fo
Finn okkum á Facebook


## FYRILESTUR FYRI RÓTARÝKLÚBBUR REYKJAVÍKUR

Fyrst í juni mánaða, helt sendimaðurin fyrilestur fyri limunum í Rótarýklúbbur Reykjavíkur við evninum: "*Aktuel mál úr Føroyum við áhuga fyri íslendingar*". Uml. 70 limir vóru møttir og stórur áhugi var at seta spurningar. Øll, sum tóku orðið, ynsktu at økja og styrkja um samstarvið millum Føroyar og Ísland. Eitt av evnunum, sum umrødd vórðu, var samstarvið millum londini, m.a. sjúkraviðgerðir. Serstøk grein um hetta er omanfyri í hesum mánaðarbrævi.

## HÁTÍÐARHALD Í SAMBANDI VIÐ AT HORNASTEINURIN VARÐ LAGDUR TIL STOFNUN VÍGDÍSAR FINNBOGADÓTTUR



*Mynd 8. Nýggi Stovnur Vígdisar Finnbogadóttur.*

19. juni luttók sendimaðurin í hátíðarhaldinum í sambandi við, at hornasteinurin varð lagdur til Stovnur Vígdisar Finnbogadóttur. Jón Atli Benediktsson, rektari í Háskóla Íslands, Auður Hauksdóttir, ið er dagligur leiðari fyri stovnin og Vígdís Finnbogadóttir hildu øll røður og takkaðu fyri tann stuðul, sum varð veittur stovninum. Tey vóru øll sera fegin um tann stuðul, ið Føroyar hevði veitt stovninum. Nýggi bygningurin stendur væntandi liðugur í november mánaða í ár. Ein stova verður, sum skal hýsa og taka sær av føroyskum máli.